## Brandstøðin í Havn 75 ára móttøku

Frá morgunstundini nýttu nógv fólk høvið at vitja Brandstøðina á 75 ára degnum, har sløkkiliðsstjórin Kartni Jacobsen tók í móti. Umframt ein drekkamunn og høvi at síggja teir gomlu og nýggju brandbilarnar, fingu tey vitjandi eisini søguligu bókina, ið Niels Juel Arge skrivaði um Tórshavnar Sløkkilið í 1983, tá Brandstøðin hevði 50 ár á baki. Móttøka er á Brandstøðini frá klokkan 10 til 17 í dag. Klokkan 16 fer Heðin Mortensen, borgarstjóri, at halda røðu og Høgni Joensen, skúlastjóri, fer at greiða frá um søguna hjá Tórshavnar Sløkkiliði. Sum sæst á myndini, fekk sløkkiliðsleiðarin í morgun eitt eintak av nýggju bókini hjá Birgari Johannesen um Havnina frá Mentamáladeildini.



# Føroyskir fíggjarstovnar væl fyri

**- Stórsti trupulleikin á altjóða fíggjarmarknaðinum í løtuni er manglandi álit bankanna millum. Nokk av likviditeti er til, men bankar vilja treyðugt læna pening til hvør annan, og tað er trupulleikin, sigur Bjarne Jensen, bankaserfrøðingur**

FÍGGJARKREPPA

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nú hart leikar á í fíggjarheiminum og á fíggjarmarknaðunum í fleiri av grannalondum okkara, eru nógv sum bera ótta fyri, hvussu føroysku fíggjarstovnarnir eru fyri. Men sambært bankaserfrøðinginum Bjarne Jensen hava føroysku fíggjarstovnarnir verið ábyrgdarfullir og hepnir við teirra strategi-um.

- Tað tykist sum at føroysku fíggjarstovnarnir hava lært at stýra við skili og ábyrgd. Hetta kemst kanska serliga av bankakreppuni í nítiárunum. Men tað sær út til at Føroyar í dag ikki eru ein botnleysur pengakassi sum tá, og at fíggjarstovnarnir eru meira ábyrgdarfullir í dag, vísir Bjarne Jensen á.

### Hava satsað rætt

Virðisbrævamarknaðurin hevur seinastu dagarnar verið í fríum falli, serliga eru virðisbrøv í bankum rakt serliga hart. Men sambært Bjarne Jensen eru føroysku fíggjarstovnarnir ikki harðari rakt enn onnur.

- Tað vísir seg at verða sera heppið fyri føroyingar, at bankakervini hjá tykkum ikki eru so tætt knýtt at Íslandi í løtuni. Har sær út til at koma eitt ordiligt skradl, og í dag giti eg at fíggjarstovnarnir í Føroyum eru sera glaðir fyri at teir hava vent eygunum meir móti danska marknaðinum, og ikki hava leitað út í stóru verð, eins og íslendingar hava gjørt seinastu árini. Tað vísir seg nú at tann strategiin hevur lønt seg, sigur Bjarne Jensen, bankaserfrøðingur.



*- Føroysku fíggjarstovnarnir hava nokk av likviditeti og síggja út til at vera tryggir og ábyrgdarfullir stovnar, sigur Bjarne Jensen, bankaserfrøðingur*

### Manglandi álit veruligi trupulleikin

Ilt er at spáa um vit enn hava sæð tað ringasta av fíggjarkreppuni. Dag um dag broytast viðurskiftini somikið skjótt, at enn er ógjørligt at siga, hvønn veg tað ber. Sambært Bjarne Jensen er størsti trupulleikin í løtuni ikki manglandi likviditetur, men manglandi álit.

- Tað er ringt at siga um tað ringasta hevur verið enn. Trupulleikin á fíggjarmarknaðinum er ikki at tað resta pengar í. Har er nokk av likviditeti á fíggjarmarknaðinum, trupulleikin er bara tað skeiva býtið av likviditeti, sum vit síggja. Fíggjarstovnarnir vilja treyðugt læna pening til grannabankan, men velja heldur at seta peningin inn í Evropeiska Tjóðbankan, og so noyðist grannabankin hagar at læna peningin fyri hægri rentu enn annars. Álitið millum bankarnar er sera avgerandi. Um álitið er vekk, úrslitar hetta í at rentan veksur á útlánunum, og tað er har trupulleikin uppstendur. Marknaðurin við at læna pengar út til aðrar bankar og einstaklingar turkar út, greiðir Bjarne Jensen, bankaserfrøðingur, frá.

### Føroysku fíggjarstovnarnir væl fyri

Bjarne Jensen hevur í mong ár fylgt væl við gongdini í Føroyum, og kennir sum heild sera nógv til teir báðu stóru fíggjarstovnarnar í Føroyum. Og sambært honum stendur als ikki so illa til, sum leysasøgur vilja vera við hesar dagarnar.

- Tey seinastu tølini eg sá frá fíggjarstovnunum vóru frá 30. juni í ár, og tá sá út til at teir báðu stóru fíggjarstovnarnir í Føroyum høvdu tað gott og sóu sera sunnir út. Teir høvdu nokk av likviditeti, og síggja enn út til at vera púra tryggir stovnar. Hetta er eisini úrslitið av teirri ábyrgdarfullu fíggjarstýringini, sum bankarnir hava ført seinastu árini, við ikki at taka for nógvan váða á seg, sigur Bjarne Jensen, bankaserfrøðingur.

Enn eru nýggjastu tølini ikki komin frá teimum báðum stóru bankunum, men Bjarne Jensen væntar ikki at heilt stórar broytingar eru frá seinastu uppgerðini, og tískil síggja føroyski stovnarnir enn út til at vera sunnir og tryggir fíggjarstovnar.



*Føroysk partabrøv stóði í vøkstri á keypsskálanum í Keypmannahavn*

## Føroysk partabrøv vaksin í dag

**Eftir at tey fullu nógv í virði í gjár, stóðu tey føroysku partabrøvini á keypsskálanum í Keypmannahavn aftur í vøkstri í dag**

PARTABRØV

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tey trý føroysku feløgini, sum eru skrásett á partabrævamarknaðinum í Keypmannahavn, fullu sera nógv í virði í gjár. Men í dag stóðu partabrøvini aftur í vøkstri.

Størsta vøksturin hevði Atlantic Petroleum, sum á middegi í dag var vaksið við 3,29 prosentum, og kostaði hvørt partabrævið tá 1255,00 krónur. Har vóru 1543 partabrøv handlaði á middegi.

Næststørsta vøksturin átti Eik Banki. 688 partabrøv vóru keypt og seld á middegi í dag, og partabrævið í Eik Bank kostaði á middegi í dag 169,00 krónur, og er tað ein vøkstur uppá 2,42 prosent frá klokkan átta í morgun, tá keypsskálin í Keypmannahavn lat upp.

Triðja felagið, sum er skrásett á partabrævamarknaðinum í Keypmannahavn, Føroya Banki, stóð eisini í vøkstri í dag. Eitt partabræv í Føroya Banka kostaði á middegi 171,50 krónur, og er tað ein vøkstur uppá 1,48 prosent frá morgunstundini av. Nógv flest føroysk partabrøv vórðu keypt og seld í Føroya Banka. Har vóru 4303 partabrøv keypt og seld á middegi í dag.

### Oljuprísurin hækkaður

Prísurin á ráolju var í gjár heilt niðri á 96,4 dollarar fyri tunnuna. Men seinni á kvøldinum vaks prísurin aftur, og er nú omanfyri 100 dollarar fyri tunnuna, nevnliga 100,64 dollarar fyri hvørja tunnu av ráolju. Men samstundis sum oljuprísurin er lækkaður nógv um vikuskiftið, er tann amerikanski dollarin vaksin, og tískil er tann veruligi prísurin á oljuni ikki nógv broyttur.

Tó er greitt at oljuprísurin nú er munandi lægri enn hann var um hálvan juli mánað, tá hvør tunnan kostaði 145 amerikanskar dollarar fyri hvørja tunnu av ráolju.